## Stýra ikki marknaðinum



Ísland og serliga landsins búskapur hava fingið nógva umrøðu teir seinastu dagarnar, men íslendski fíggjarmálaráðharrin, Árni Mathiesen, leggur dent á, at tað eru viðurskifti uttan fyri Ísland, sum eru orsøk til fallið á partabrævamarknaðinum og tað fallandi krónuvirðið. Í samrøðu við fjølmiðlarnar vildi ráðharrin ikki siga, hvat skal henda, fyri at íslendska stjórnin noyðist at fremja tiltøk fyri at ávirka gongdina á gjaldoyra- og fíggjarmarknaðinum.

## Páskastevna í Meinigheitshúsinum

Í døgunum 21. til 24 mars verður páskastevna í Meinigheitshúsinum í Havn undir heitinum »Tað er fullgjørt« Johs. 19,30. Byrjað verður við møti Langa fríggjadag klokkan 18. har Hanus Simonsen, prestur talar og Kristiliga Sangkórið syngur. Møtini halda fram leygardagin, Páskadag og 2. páskadag – allar dagarnar kl. 18.00. Páskadag kl. 22.00 verður eisini eitt Ungdómstiltak á skránni. Á loftinum er ein »Páskastova« gjørd, har høvi verður – á ein serligan hátt – at »merkja« tær fyrstu páskirnar – fyri skjótt 2000 árum síðani. Møtini verða tulkað til enskt, tað verður barnaansing, bønarløta verður hálvan tíma áðrenn møtini og drekka verður aftaná. - Øll eru hjartaliga vælkomin, bæði til møtini og at uppliva »Páskastovuna«, lata tey heilsa úr Meinigheitshúsinum í Havn.

# Epilepsi ikki heimsins endi

**Tað segði 19 ára gamla Ása Súnadóttir á fundi, sum Epileptikarafelagið skipaði fyri í Miðlahúsinum í gjárkvøldið**

EPILEPSI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroyska Ása Súnadóttir av Skála greiddi frá sínum unga og lutfalsliga stutta lívi við epilepsi.

Tað byrjaði fyri trimum árum síðani, tá hon var á eftirskúla í Danmark.

- Tað var ítóttadagur, og eg skuldi renna. Eg var einki serliga væl fyri, hevði sovið lítið og einki etið ella drukkið. Eg minnist ikki, at eg kom um mállinjuna, men tað kom eg so, greiddi Ása Súnadóttir frá.

Hon minnist lítið annað enn, at tað stóðu nógv fólk uppi yvir henni og tosaðu, men hon skilti einki av tí, tey søgdu. Tað var fyrsta herindi, hon fekk. Tá var hon sekstan ára gomul.

Fyrstu tíðina eftir hetta var tað rímiliga lætt at tosa við skúlafelagarnar á eftirskúlanum, tí teir høvdu jú upplivað hana havt eitt epileptiskt herindi og skiltu, hvat alt í veruleikanum snúði seg um. Hetta var nógv truplari, tá hon kom heim aftur til Føroya, tí her kundi eingin veruliga seta seg inn í, hvat Ása Súnadóttir fór ígjøgnum.



*Ása Súnadóttir hevur lært at liva við epilepsi. Á fundinum í Miðlahúsinum í gjárkvøldið greiddi hon frá sínum lívi sum epileptikari*

*Mynd: Leo Poulsen*

- Tað var trupult at koma inn á evni, tí fólk vistu ikki, hvussu tey skuldu fyrihalda seg mótvegis epilepsi. Kortini vísti tað seg, at fólk vóru forvitin upp á ein góðan máta, segði Ása Súnadóttir.

Men hon viðgekk eisini, at lívið sum epileptikari tað fyrstu tíðina langt frá var ein dansur á rósum.

### Mátti gevast

Hon hevði javnan epileptisk herindi, men kortini byrjaði hon á studentaskúla summarið 2005.

- Tað dámdi mær ógvuliga væl, men eg gjørdi tíverri tann feilin, at eg greiddi ikki lærara ella floksfeløgum frá, at eg var epileptikari, og tí kom tað sum ein skelkur fyri flokkin, tá tey upplivdu míni fyrstu epileptisku herindi skúlanum, segði Ása Súnadóttir í Miðlahúsinum í gjárkvøldið.

Hetta skuldi tó gerast nakað, ið flokkurin kom at venja seg við. Men hetta skuldi samstundis gerast meiri, enn nakar kundi liva við. Jøvnu herindini við fylgjandi vitjan av sjúkrabilinum og javna fráveran førdu í januar mánaði 2006 til, at Ása Súnadóttir mátti gevast á studentaskúla. Hetta var ein stórur ósigur fyri hana.

Og nú fylgdi ein trupul tíð.

- Eg var nógv á sjúkrahúsi, og tá eg var heima, tordi eg ikki út millum fólk. Eg tordi ikki í SMS, eg tordi ikki í biograf og eg tordi ikki á ungdómsmøti, segði Ása Súnadóttir.

Hon kendi, at fólk hildu tað vera eina stóra ábyrgd at taka sær av henni. Og tað skilir hon væl, tí hon hevur havt herindi bæði í SMS og hjá tannlæknanum.

### Lýsnaði í

Men so byrjaði at ganga betur.

- Eg fekk ein annan heilivág, sum veruliga hjálpti. Hjáárinini, sum eg hevði havt av heiliváginum, eg tók framman undan, hvurvu heilt, og herindini gjørdust munandi færri og lættari, segði Ása Súnadóttir.

Hon tordi nú aftur út millum fólk. Hon fann sær »ein fittan sjeik« - sum hon skal giftast við í summar – og hon byrjaði aftur í skúlanum á Kambsdali at lesa til student í august 2006.

Og hesaferð gjørdi hon ikki sama mistak, sum fyrru ferð.

- Eg fekk ein lærara, sum eg kenni, at greiða flokkinum frá, at eg havi epilepsi, og at tey kundu koma út fyri, at eg fekk epileptiskt herindi í skúlatímanum. Eisini greiddi hann frá, hvussu tey skuldu fyrihalda seg, tá herindini komu, greiddi Ása Súnadóttir frá.

Sjálvandi voldir sjúkan ávísar avmarkingar fyri Ásu.

- Tá vit fyltu átjan, tóku allir mínir floksfelagar koyrikort. Alt prátið í skúlanum snúði seg um hetta. Hvussu hevði seinasti koyritímin gingið. Kendi man nú víkiskyldurnar. Og hvussu við skeltunum. Eg kundi bara lurta, tí eg slapp ikki at taka koyrikortið, segði Ása Súnadóttir.

Hinvegin hevur hon eisini havt stór upplivilsi, sum hon ikki hevði havt, var hon ikki epileptikari.

- Eg var á einari summarlegu í Danmark í fjør, og har var so gott at vera, at eg havi ikki orð fyri tí, segði Ása Súnadóttir, sum samstundis heitti á ungu epileptikararnar um at melda seg til leguna í ár, tí tað var eitt upplivilsi fyri lívið.

So alt í alt kundi Ása Súnadóttir staðfesta, at epilepsi ikki er heimsins endi.

Setið tykkum í samband
við Ásu Súnadóttir
Telefon 509512
sunadottir@hotmail.com
ella farið inn á:
kronisk-ung.dk
og lesið meir

# Glaður fyri mítt epilepsi

**Danski gestarøðarin, Mads Boe, greiddi frá sínum tíggju árum við epilepsi, og hóast tað kann ljóða paradoksalt, segði hann seg vera glaðan fyri at hava sjúkuna**

EPILEPSI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Mads Boe fekk síni fyrstu epileptisku herindi sum átjan ára gamal. Hetta var í fyrsta umfari kveistrað til viks sum avleiðingin av einum túri í býnum. Men tað skuldi vísa seg, at talan veruliga var um epilspsi.

- Mín fyrsta reaktión var, at nú var lív mítt oyðilagt. Eg livdi í mong ár í noktan fyri veruleikanum. Eg var heldur ikki so illa plágaður av sjúkuni, hevði eini sekssjey herindi um árið, og tey vóru rímiliga løtt, greiddi Mads Boe frá.

Fyrsta veruliga vendin kom, tá hann í 2002 sum duravørður fekk eini herindi, og henda hending hevði so stóra ávirkan á hann, at hann veruliga tók seg saman.

- Eg legði av at drekka, og tað var eitt stórt stig fyri meg, tí tað snúði seg í mestan mun um at ballast, tá eg fór í býin, greiddi Mads Boe frá.

Næsta broytingin kom í januar 2003, tá hann skifti lækna. Tá varð gamli heilivágurin skiftur út við nýggjan, og tá slapp hann púrasta av við hjáárinini, sum annars høvdu plágað hann, og samstundis hildu herindini uppat.

Triðja stigið til eitt trupulleikafrítt lív varð tikið, tá hann var á summarlegu í 2005.

- Tá var veitsla eitt kvøldið, og eg gjørdi av at drekka nakrar øl. Og dagin eftir kendi eg mær einki hóttafall, og síðani havi eg funnið út av hvar markið gongur – og nú fari eg ongantíð út um tað, segði Mads Boe.

Til seinast í sínum innleggi spurdi hann fundarfólkið, um tey hildu, hann var glaður fyri at hava epilepsi. Og hann svaraði sjálvur.

- Jú, eg eri glaður fyri at eg havi epilepsi, tí hevði eg ikki tað, hevði eg ikki havt tey fantastisku upplivilsi, eg havi havt, og eg hevði heldur ikki havt hitt unnustu mína. So, jú, eg eri glaður um, at eg havi epilepsi, segði Mads Boe.



*Mands Boe var annar av donsku fyrilestrarhaldarunum*

*Mynd: Leo Poulsen*